## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og regn. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið lot av ymsum ættum og ælingur. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið Hvítusunnudag:**
Fleyr til gul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið 2. Hvítusunnudag og týsdagin:**
2. Hvítusunnudagin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar, men týsdagin upp í ein strúk av landsynningi og møguliga regn. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Svensk børn vitjaðu flokk í Leirvík

**Týsdagin komu tveir sættu flokkar á vitjan á Sosialinum á Argjum. Annar flokkurin kom úr Leirvík, og hin kom heilt úr Andersløv í Svøríki**

VITJAN
*Solby A. Eliasen*



*Í vikuni fekk Sosialurin á Argjum vitjan, tá ein sætti flokkur úr Leirvík saman við børnum úr einum sætta flokki í Andersløv í Svøríki vitjaðu redaktiónina*
*Mynd: Jan Müller*

Tann svenski flokkurin, sum telur tíggju børn, eru komin higar at vitja sætta flokk í Leirvíkar skúla. Orsøkin til, at tey bert eru tíggju í tali er, at í Andersløv ganga fimti og sætti flokkur saman, men einans tey í sætta flokki eru komin til Føroya.

Sambandið teirra millum kom í lag, tá tey gingu í fjórða flokki, tá flokkarnir báðir byrjaðu at skriva saman í samband við eina verkætlan, sum tann svenski flokkurin var farin í holt við. Síðani hevur flokkurin í Svøríki gjørt eitt miðvíst arbeiði fyri at savna pening inn til at koma hendanvegin á vitjan.

Tey komu til Føroya fríggjadagin í síðstu viku, og tey hava verið nógva staðni. Millum annað vóru tey til kappróður á norðoyastevnu, tey hava eisini verið á Viðareiði, undir Vestmannabjørgunum og týsdagin løgdu tey so leiðina fram við Sosialinum, tá tey vóru komin til Havnar at bowla.

Bjørg Wiberg er mamma at einum drongi í svenska flokkinum. Hon hevur búð í Svøríki síðani miðskeiðis í áttatiárunum, og hon sigur, at børnini eru avbera fegin um henda túrin. Tey lata væl at og siga, at tey hava upplivað nógv spennandi. Ongin av sviunum hevði verið í Føroyum frammanundan.

– Fleiri av teimum høvdu ongantíð flogið áður, so bara tað í sjálvum sær var eitt stórt upplivilsi fyri fleiri av teimum, greiðir hon frá.

Tað eru trý vaksin við í ferðalagnum. Tveir lærarar og so Bjørg sum foreldur. Tey ætla sær at leggja leiðina aftur til Klaksvíkar, tí tað var so ófantaligt veður norðoyastevnuaftan.

– Vit fingu ikki so nógv burturúr leygardagin, tí tað regnaði so illa, so vit hava gjørt av at fara ein túr afturat til Klaksvíkar. Tað verður helst hósdagin, sigur Bjørg Wiberg.

Eisini er onkur fjalltúrur á skránni. Fríggjakvøldið skipa leirvíkingarnar so fyri eini kvøldsetu fyri svíunum, og so gongur leiðin heimaftur til Svøríkis leygardagin.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 12 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 13 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | 10 |
| Halifax | 19 |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 17 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 20 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 30 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 30 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 21 |
| New York | 13 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 14 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 990 hPa. í útsynning úr Íslandi grynnist. Eitt annað lágtrýst, 988 hPa. á 53N-34V fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjamorgunin.




Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi grynnist og brúgvalagið haðani norður um Føroyar fer norðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 04/06 kl. 06[00]– 05/06 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,3°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 04/06 kl. 06[00]–05/06 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 8,3 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

28. mai: Mánin longst frá jørðini
31. mai: Tendring
7. juni: Fyrra kvarter
12. juni: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. juni | — | 12.15 | 11.15 | 23.37 | 11.30 | 23.52 | 01.53 | 14.15 | 02.53 | 15.15 | 10.30 | 22.52 | 09.30 | 21.52 | 00.08 | 12.30 | 01.08 | 13.30 | — | 12.00 | 00.53 | 13.15 |
| 7. juni | 00.37 | 13.12 | — | 12.12 | — | 12.27 | 02.37 | 15.12 | 03.37 | 16.12 | 11.27 | — | 10.27 | 23.02 | 00.52 | 13.27 | 01.52 | 14.27 | 00.22 | 12.57 | 01.37 | 14.12 |
| 8. juni | 01.47 | 14.22 | 00.47 | 13.22 | 01.02 | 13.37 | 03.47 | 16.22 | 04.47 | 17.22 | 00.02 | 12.37 | 11.37 | — | 02.02 | 14.37 | 03.02 | 15.37 | 01.32 | 14.07 | 02.47 | 15.22 |
| 9. juni | 02.57 | 15.19 | 01.57 | 14.19 | 02.12 | 14.34 | 04.57 | 17.19 | 05.57 | 18.19 | 01.12 | 13.34 | 00.12 | 12.34 | 03.12 | 15.34 | 04.12 | 16.34 | 02.42 | 15.04 | 03.57 | 16.19 |

5 707265 100050 >